## Teir eldru vunnu

Sum vant, so varð venjingin mánadagin endað við dysti millum yngra og eldra partin av landsliðshópinum. Hesa ferð var tað eldri parturin av liðnum, sum var við yvirlutan. Og at lagið er av tí besta, var sjónligt, tá »teir gomlu« stillaðu upp til liðmynd og kravdu myndamannin út á vøllin.



## 110 fjølmiðlafólk

Eisini í Skotlandi er áhugin fyri landsliðnum ovurstórur. Ikki færri enn 110 fjølmiðlafólk hava boðað FSF frá, at tey koma til dystin, og tað vil siga, at fyri aðru ferð á rað er talið av fjølmiðlafólki farið upp um tey 100. Talan er um 18 myndafólk, 47 fólk til skrivandi miðlarnar, 21 útvarpsfólk og 24 sjónvarpsfólk.

# Armarnar niður

**Dysturin móti skotum verður minst líka torførur, sum hann var móti italia, ávarar Jógvan Martin Olsen. Hann hevur enn ikki gjørt av, hvussu hann fer at stilla liðið til mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir venjingina mánadagin seinnapart skuldi landsliðsvenjarin fyrst spæla "golfdyst" móti hjálparvenjara sínum. Og eftir at hesin var avgreiddur við 10-6 sigri til landsliðsvenjaran, var Jógvan Martin Olsen til reiðar at taka eitt prát um uppgávuna, sum nú stendur fyri framman.

Og tað verður lagdur stórur dentur á, at talan nú er um ein heilt nýggjan dyst. At fáa spælararnar at gloyma, at teir mundu skapt sensatiónina móti heimsmeistarunum.

– Tað týdningarmesta hjá okkum er, at vit fáa armarnar niður. Spælararnir skulu sjálvandi hava rós fyri avrikið leygardagin. Men vit mugu onkursvegna nullstillað okkum sjálvar fyri síðani at taka útgangsstøði har, sum vit veruliga eru.

### Nærum eins sterkir

Og tað er ikki bara uttan orsøk, at landsliðsvenjarin vil hava spælararnar at gloyma Italia. Skotar eru bert eitt stig aftan fyri Italia á stigatalvuni í okkara undankappingarbólki, og á FIFA-styrkislistanum eru teir seinasta árið klintraðir heilt nær teimum tíggju ovastu liðunum.

- Og tú skalt eisini minnast til, at skotar kanska í enn størri mun eru til reiðar at ofra ein innsats móti føroyingum.

- Og hóast tað hevur riggað væl nú, so haldi eg framvegis, at vit skulu halda lágan profil. Vit skulu bara spola tíðina heilt stutt aftur fyri at minnast á minni góð úrslit. Og tí vita vit, at skal úrslitið vera gott, so skal innsatsurin verða optimalur hvørja tí einastu ferð.

Skal innsatsurin verða tann optimali, so er eisini neyðugt, at spælararnir eru væl fyri kropsliga. Við teirri sannroynd, at Fróði Benjaminsen aftur er tøkur. Er so hugsandi, at arbeiðsavrikið móti Italia merkir, at onkur spælari verður spardur mikudagin.

- Tað er sjálvandi nakað, sum vit eisini mugu hava í huga. Tit vita líka so væl sum eg, at eftir dystin móti Italia kann eg ikki siga við Súna ella Mikkjal, at teir skulu út á beinkin. Men sjálvandi havi eg nakrar møguleikar at velja ímillum, og teir eru so enn fleiri, nú Fróði er tøkur, so hetta er væl ein positivur trupulleiki.

- Men sjálvandi havi eg tætt samband við heilsustabin hjá okkum um, hvussu menn eru fyri. Spælararnir sjálvir søgdu eisini leygarkvøldið, at teir ongan tíð í lívinum høvdu verið so troyttir, og nú vit skriva mánadag, eru framvegis tríggir spælarar, sum ikki venja við fullari ferð. So møðin er avgjørt ein faktorur, sum vit hava í huga, tá liðið skal setast.

### Skulu vaska sær

Móti skotum hava Føroyar ofta staðið seg væl á heimavølli. Millum annað hava vit tvær ferðir spælt javnt á Svangaskarði. Við avrikunu móti Georgia og Italia í huga ber illa til at ímynda sær annað, enn at lagið og sjálvsálitið í hópinum er framúr.

- Eg vil siga tað so, at lagið alla tíðina hevur verið gott í hópinum. Eisini tá tað hevur gingið minni væl. Men samstundis er eingin ivi um, at vit fegnir vilja vaska stórtapið í Glasgow av okkum.

- Og so er eingin loyna, at kvaliteturin í hópinum er betri í dag, enn hann hevur verið. Vit hava verið óvanliga hart plágaðir av skaðum, men vónandi er tann tíðin nú farin.

- Men fyrst og fremst ræður um hjá okkum at spæla eins væl, sum vit gjørdu leygardagin. Uttan at taka nakað frá nøkrum, so var hugburðurin framúr leygardagin. Bæði í fyrireikingunum og til dystin. Spælararnir vóru kyniskir og róligir, og tað sigur væl eisini nakað, at vit levera eitt risa arbeiðsavrik móti heimsmeistarunum, uttan at spælararnir fáa eitt einasta gult kort, sigur altso Jógvan Martin Olsen.



*Súni Olsen og Mikkjal Thomassen vóru tveir av spælarunum, sum tóku sær hampuliga av løttum mánadagin. Ei undur í, tá hugsað verður um kilometrarnir, sum teir runnu leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Jógvan Martin eigur avgerðina



**Hóast hann vónar at sleppa millum teir fyrstu ellivu, so letur Fróði Benjaminsen tað vera púrasta upp til venjaran, hvørt so verður**

*Fróði Benjaminsen vil á ongan hátt nerta við spurningin, um hann skal aftur á liðið ella ikki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin mátti hann hyggja at, meðan liðfelagararnir stríddust móti heimsmeistarunum. Men hóast ikki ein fingur kann setast á avrikið hjá spælarunum í tí dystinum, so vónar Fróði Benjaminsen, at pláss er fyri sær, nú liðið skal setast av nýggjum til Skotlandsdystin.

– Mann kann so ikki gremja seg um tað, sum hinir løgdu fyri leygardagin. Men mikudagin er ein nýggjur dystur, og so er tað upp til venjaran, hvørja loysn hann velur, sigur Fróði, sum als ikki vil tosað um, hvørt ella hvar á vøllinum hann vónar ella væntar at spæla.

Men tá tað kemur til sjálvan dystin móti skotum, so er boðskapurin frá Fróða greiður.

- Tað hava vit allir tosa um. Innsatsurin móti Italia var framúr, men hesa ferð er talan um nýggjan dyst, og tí skulu armarnir niður. Leygardagurin skal gloymast.

Tit hava ofta staðið tykkum væl móti skotum. Vænta tit, at tit eisini gera tað hesaferð?

– Seinast teir vitjaðu her, høvdu vit 2-0 leiðslu, sum teir tó javnaðu, men ein endurtøka av tí úrslitinum vildi nú verið heilt stuttlig.